Hervør Pálsdóttir
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um veðurlagspolitikk Føroya, settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvussu gongur við arbeiðinum at gera ein nýggjan veðurlagspolitikk fyri Føroyar ?
2. Nær ætlar landsstýrismaðurin at bjóða øllum flokkum við í arbeiðið fyri at fáa breiða semju um veðurlagspolitikkin ?
3. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin at tryggja sær, at veðurlagspolitikkurin verður fylgdur, soleiðis at vit røkka málinum at minka um okkara útlát?

Viðmerkingar:
31. desember 2020 gekk veðurlagspolitikkur Føroya út. Tað vil siga, at síðan tá hava Føroyar ongan almennan veðurlagspolitikk havt. Landsstýrismaðurin hevur úttalað seg í miðlunum um, at hann arbeiðir við einum nýggjum veðurlagspolitikki. Hesin fyrispuringur verður settur fyri at fáa at vita, hvussu tað gongur við arbeiðinum at gera ein nýggjan veðurlagspolitikk.

Á Løgtingi, 18. februar 2021

Hervør Pálsdóttir